Álit

í

løgtingsmáli nr. 73/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (Ræðislógin) (Yvirtøka av málsøkinum sjórættur)

Aksel Vilhelmson Johannesen, løgmaður, hevur lagt málið fram 7. mars 2024, og eftir 1. viðgerð tann 20. mars 2024 er tað beint Uttanlandsnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 2. apríl 2024.

Ein samd nevnd fegnast um yvirtøkuna av málsøkinum sjórættur. Nevndin metir tað vera umráðandi fyri Føroyar, at ræðið á so týðandi málsøki er á føroyskum hondum.

Við yvirtøkuni av sjórættinum verða lóggávuvaldið, útinnandi valdið og fíggjarliga ábyrgdin á øllum sjóvinnuøkinum yvirtikin sum føroyskt sermál ólavsøkudag 2025.

Hendan yvirtøkan hevur tætt tilknýti til onnur øki, sum longu eru yvirtikin. Tað eru trygd á sjónum, loðsøki, vitaverk og sjóuppmerking.

Orsøkin til, at yvirtøkan fyrst verður formliga ólavsøkudag 2025, er fyri at tryggja, at føroyskir myndugleikar fáa stundir at fyrireika yvirtøkuna, samstundis sum dentur verður lagdur á, at Føroyar varðveita neyðugar altjóða góðkenningar.

Tað er av alstórum týdningi, at føroyska sjóvinnan ikki verður negativt merkt av yvirtøkuni, og at kravda lóggávan á sjórættarøkinum verður fyrisitin rætt og fylgir altjóða sáttmálunum, eisini eftir yvirtøkuna.

Yvirtøkan skal tískil skipast so skynsamt sum gjørligt, soleiðis at umsitingin aftaná yvirtøkuna hevur neyðuga innlitið og orkuna til at tryggja, at verandi og nýggir sáttmálar og broytingar í sáttmálum kunnu setast skynsamt í verk í føroyska lóggávu.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Uttanlandsevndin, 18. apríl 2024

Bjarni Hammer formaður	Bárður á Steig Nielsen næstformaður	Sólvit E. Nolsø
Annika Olsen	Liljan Weihe	Jenis av Rana
	Jacob Vestergaard	